Gongur strúkandi við flúgvingini

10,4% fleiri ferðafólk ferðaðust um flogvøllin í Vágum í 2001 í mun til 2000. Serliga eru tað rutirnar til Bretlands, sum hava givið vøksturin. Atlantic Airways ætlar at halda áfram við at flúgva til Aberdeen í vetur

FLOGFERÐSLA/-HAGTØL
Heri á Rógvi

Tað gongur eftir øllum at døma gott hjá Atlantic Airways og hini, sum flúgva til og úr Føroyum.

11. september. Dýrari prísir. Tað tykist ikki sum um, at tað er nakað, ið kann halda føroyingum frá at flúgva. Stjórnirnar bæði í Sambandsríkinum og í fleiri evropeiskum londum hava verið noyddar til at seta umfatandi búskaparlig átøk í verk fyri at bjarga teimum afturútsigldu flogfeløgunum, orsakað av 11. september. Men soleiðis er ikki í Føroyum. 10,4% fleiri ferðafólk ferðaðust um flogvøllin í Vágum í 2001 í mun til 2000.

Bretland

Samlaða ferðafólkatalið fyri 2001 gjørdist 158.056. Tað er einki yvir at dylja, at best umtókta flogleiðin er tann til og úr Kastrup. 128.055 fólk hava hetta seinasta árið ferðast til og úr Danmark. Tað er uppgivið, hvussu stórur partur av hesum hevur ferðast til Kastrup, men tað er givið, at hetta er ein rættiliga stórur partur.

Vanliga er tað Ísland, ið er næst mest vitjaðu ferðamálið hjá føroyingum, men í 2001 var tað Stóra Bretland, sum fekk hetta plássið, og Ísland mátti taka til takkar við einum triðja plássi.

– Ikki bert ferðafólkatalið hevur sett dám á virksemi í floghavnini. Fráferðirnar og komurnar eru somuleiðis øktar munandi.

Í fjør vóru 5.869 fráferðir og komur við flogførum og tyrlum. Hetta er 21,7% meiri enn árið fyri, tá tilsamans 4.821 fráferðir og komur vóru. Størsta økingin stavar her frá tyrluflutningi bæði innanlanda og í frálandavinnuni. Innanoyggja gjørdu tyrlurnar 1.721 ferðir til og úr Vága Floghavn, meðan 511 túrar vóru gjørdir til og frá boripallum í føroyskum sjóøki, skrivar Vága lufthavn í tíðindaskrivi.

Víðvíkjandi post og farmi er tað at siga, at hetta er um tað sama sum í ár 2000. Posturin er farin at lítið vet upp, men farmurin er farin niður.

– Hetta er ikki nøktandi, men stendst av, at rúm ikki hevur verið í flogførunum fyri meira posti og farmi, skrivar Vága lufthavn.

Til Aberdeen

Tey nógvu ferðandi hevur sjálvandi eisini merkt støðuna hjá Atlantic Airways. Felagið hevur nú í eina tíð flogið til og úr Aberdeen í Skotlandi, og hesum ætla teir eisini at halda áfram. Ætlanin er at flúgva tvær ferðir um vikuna til Aberdeen. Túrarnir verða eftir ætlan mánadag og hósdag.

Samstarv við oljufeløgini Agip, Amerada Hess og BP Amoco hevur ment grundarlagið fyri hesi flúgvingini, og tí gjørdu vit av at leingja flúgvingina, so nú verður flogið alt árið til Aberdeen. Annars var ætlanin at steðga flúgvingini í vetur og taka hana upp í summar, sigur Magni Arge, stjóri fyri Atlantic Airways.

Hóast oljuleitingin við Føroyar verður minni komandi ár, so vónar og væntar Atlantic Airways, at tað framvegis fer at loysa seg hjá teimum at flúgva til Aberdeen.

Maður skaddur umborð á Clare

Hósdagin var ein maður so mikið óheppin, at hann varð kleimdur millum tveir trailarar og noyddis á sjúkrahús.

Fyri kortum hendi eitt óhapp umborð á skipinum Clare, sum Smyril Line leigar. Ein maður kom illa fyri umborð á skipinum. Maðurin, sum eftir hvat skilst er úr Litava. Hann er, sambært fjølmiðlum í Hetlandi, komin so fyri, at hann er vorðin kleimdur millum tveir trailarar, og hann hevur brotið beinið.

Maðurin var fluttur á sjúkrahús í Hetlandi av tyrlu. Eftir hvat skilst, so er hann lagdur undir skurð.

Sambært fjølmiðlum í Hetlandi, so hendi óheppið hósmorgunin um níggju tíðina.

Av Smyril-Line verður upplýst, at teir í løtuni leiga skipið frá einum donsku reiðaríið við manning. Tað ber ikki til hjá teimum at siga tað nógva, uttan tað, at eitt óhapp varð komið fyri. Tað eydnaðist okkum ikki at fáa samband við skiparan umborð á Clare.

Nýggj útgáva av Business Guide

ÚTGÁVA
Heri á Rógvi

– Eftirspurningurin eftir hesum bóklinginum hevur verið stórur, so tað er týðuligt, at tørvur er á upplýsingum av hesum slag, ikki minst nú áhugi er fyri kolvetnisframleiðslu í Føroyum, skrivar Rasmussen og Weihe í tíðindaskrivi, nú Business Guide er komin útaftur.

Business Guide er eitt hefti, skrivað á enskum, við praktiskum upplýsingum um Føroyar, mest ætlað útlendskum vinnufyritøkum, ið vilja vita, hvussu føroyska samfelagið virkar og, og hvørjar lógir galda her. Greitt verður frá um føroyskt vinnulív, peningaviðurskifti, skattareglur og onnur viðurskifti, ið hava týdning fyri vinnuna.

Hetta er triðju ferð, at Business Guide verður givin út. Businesss Guide fæst við at venda sær til Rasmussen og Weihe.



Ferðslan í Havn tvífaldað

Nógv tann mesta ferðslan er eftir Norðara Ringvegi. Tekniska nevnd í býráðnum arbeiðir við at útgeva fleiri parkeringspláss

FERÐSLA
Turið Kjølbro

Mynd: Álvur Haraldsen

Ferðsluteljingarnar, sum vórðu gjørdar í Havn í fjør, vísa, at ferðslan er tvífaldað eftir tveimum árum. Hetta ger neyvan nakran, sum dagliga ferðast í býnum, bilsnan, tí mangan er ógvuliga trongt at koma fram í sjálvum miðbýnum, og nærum ómøguligt at finna eitt pláss at seta bilin. Fólk seta tí bilin frá sær alla staðni, ikki so sjáldan í túnum hjá fólki, sum býr í býnum.

Í miðbýnum veksur virksemið alsamt, fleiri handlar lata upp og nógvar umbyggingar eru í gongd í senn, men parkeringsplássini verða ikki fleiri. Tey fimm parkeringsplássini, sum eru komin afturat í Tórsgøtu, muna lítið. Og tá ið alt virksemið hjá Tryggingarfelagnum Føroyar verður savnað undir einum á Kongabrúnni, verður tørvurin á parkeringsplássum væl størri. Á Kongabrúnni kunnu bilar sum er standa í fýra tímar, men tekniska nevnd í býráðnum hevur nú samtykt at broyta tíðina til ein tíma ístaðin.

– Tað merkir, at starvsfólk hjá Tryggingini ikki fara at seta bilin har og onnur fólk ístaðin kunnu brúka hesi plássini, sigur Sjúrður Olsen, formaður í teknisku nevnd hjá Tórshavnar býráð.

Tekniska nevnd arbeiðir við at útvega fleiri pláss, og sum skilst eru stórar ætlanir í umbúna, sum fara at bøta væl um parkeringsviðurskiftini. Hvørjar ætlanirnar eru, vil formaðurin í teknisku nevnd ikki upplýsa enn. Talan verður møguliga um ein parkeringskjallara, og møguliga eisini at gera parkeringshús á havnarøkinum.

– Ferðslan í býnum er tvífaldað eftir tveimum árum, vit fylgja við og royna at nøkta tørvin, men tað kostar ógvuliga nógv at gera parkeringsøki, og onnur øki, sum eitt nú barnaansingin, verða sum er raðfest hægri. Ynskiligt hevði verið, at fólk brúktu meiri bussarnar, sigur Sjúrður Olsen.

Bilar og ferð

Teljingarnar, sum tekniska nevnd í Tórshavnar býráð hevur staðið fyri, vísa greitt, hvar mesta ferðslan er. Við Shellstøðina við Ringvegin fara nógv teir flestu bilarnir. Í juni, tá ið tann seinasta teljingin var, fóru 14.300 bilar um døgnið framvið í mun til 9.900 heystið árið fyri. Tá var Marknagilsvegurin ikki liðugur og tí fór stórur partur av ferðsluni oman í býin.

Við tyrluplássið Yviri við Strond koyrdu 4.200 bilar um døgnið í mai í fjør og um sama mundið á teininum millum Hoyvíksvegin og Hvítanesvegin 7.300 bilar um døgnið. Við rundkoyringina við Ítróttarhøllina á Hálsi koyrdu 9.500 bilar um døgnið í seinastu viku í juni í fjør, og við Sápufabrikkina við Eystara Ringveg koyrdu 8.200 bilar.

Seinastu teljingarnar áðrenn árslok vóru vikuna undan jólum. Í Dr. Dahlsgøtu koyrdu tá 4.300 bilar um døgnið, eftir Áarvegnum 8.300 og um rundkoyringina í Havnargøtu 5.800.

Teljingarnar vísa eisini ferðina á bilunum. Eitt nú úti á Landavegnum við bygningin hjá Sev koyrdu tríggir fjórðingar av bilunum undir 60 km um tímar, 20 prosent millum 50 og 60, og eini 4 prosent omanfyri 60 km um tíman.

Fólkapensjónistar ein bata

Sambært ætlaðu broytingini í lógini fyri fólkapensjónir kunnu pensjónistar forvinna 44.000 krónur um árið áðrenn mótroknað verður í mun til 22.000 krónur, sum er galdandi í dag

PENSJÓNIR
Turið Kjølbro

– Broytingarnar í lógini fara at gera tað hugaligari hjá fólkapensjónistur at hava eina inntøku umframt pensjónina, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum

Á komandi tingfundi, sum verður 15. januar, verður uppskot lagt fyri tingið um broytingar í lógini um fólkapensjón. Broytingarnar hava til endamáls at gera fíggjarstøðuna hjá fólkapensjónistum betri. Verður uppskotið samtykt sum er, fáa fólkapensjónistar frá 1. januar í ár, tað vil siga afturvirkandi, skattafría grundupphædd, botnfrádrátturin verður tikin burtur, inntøkumarkið verður hækkað úr 22.000 kr. í 44.000 krónur, umframt at viðbøturnar verða hækkaðar við 400 krónum um mánaðin.

— Hesar broytingarnar, sum bara verða galdandi fyri fólkapensjónistar, er ein munandi bati. Grundupphæddin hjá fyritíðarpensjónistum verður eisini prístalsregulerað, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum.

Broytingarnar í lógini kosta 40 milliónir krónur um árið.

– Alt valskeiðið hevur landsstýrið bøtt um viðurskiftini hjá pensjónistunum, og arbeitt hevur verið leingi við hesum broytingunum, millum annað hevur tað tikið tíð at fáa upp á pláss, hvønn bólk broytingarnar skulu raka.

Sandoy Seafood:

Væntar Eysturbúgvan fyrsta dagin

Eingin útróður hevur verið á Sandi síðan fyri jól. Tað hevur viðrað illa, men tá ið ein løta verður, fara bátarnir útaftur

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Sandoy: Á báðum virkjunum hjá Sandoy Seafood hevur arbeiðsfólkið á gólvinum havt frí síðan beint fyri jól, men nú vænta tey, at gongd skjótt fer at koma á aftur.

Øll skipini, sum plaga at landa til virkini, eru úti, og roknast kann við, at Eysturbúgvin kemur innaftur ein av fyrstu døgunum. Teir fóru útaftur nýggjársdag og plaga at gera skjótt av. Sum skilst, hava teir fingið væl av fiski hesar dagarnar, teir hava verið úti.

Kolumbus, Nornagestur og Hoyvíkingur eru eisini farnir; teir loystu aftur síðsta fríggjadag.

Útróður hevur eingin verið síðan fyri jól. Tað hevur viðrað illa, men tá ið ein løta verður, fara bátarnir útaftur.

Ábøtur og uppteljing

Jóan Petur Vest sigur, at meðan fiskaarbeiði hevur ligið stilt, eru smávegis ábøtur framdar á virkjunum á Sandi og í Skopun, og serliga eru tað gólvini, ið hava fingið eina bøtandi hond. Hugt hevur eisini verið at maskinunum.

– Krøv verða sett um, at eitt nú gólvini eru í góðum standi. Er ov nógv slit á teimum, eru tey truplari at halda rein.

Jóan Petur Vest sigur, at tey eisini hava fingist við at telja upp vørugoymsluna, nú farið verður undir eitt nýtt ár.

Øll skipini, sum plaga at landa til Sandoy Seafood, eru farin útaftur, og væntandi verður Eysturbúgvin tann fyrsti, sum kemur innaftur at landa, helst longu tíðliga í hesi vikuni